## VIÐMERKINGAR

# Kringvarp, gransking og tjóðararvur

**Mortan Hentze**

Í teimum fyrstu summarmánaðinum í ár, fekk ein í Dimmalætting fleiri ferðir høvi at lesa um, hvussu ein stórur partur av tí elsta føroyska sjónvarpstilfarinum hjá SVF liggur í vanrøkt og forferst.

"Hetta er bæði synd og skomm, og her skal okkurt munagott gerast sum skjótast" vóru øll samd um, sum úttalaðu seg um málið.

Mær vitandi er einki munagott gjørt enn, og tað er spell, tí kringvarpstilfar og annað talgilt (elektroniskt) tilfar er ein sannur fongur fyri tey, sum granska og hava áhuga í føroyskari samtíðarsøgu, og ikki minst ein gullpottur fyri komandi ættarlið, ið ynskja at kunna seg um og granska í samtíð okkara.

Tíverri er nógv av tí elsta føroyska kringvarpstilfarinum longu fari fyri skeytið, hugsa bara um øll tey yvirspældu bondini hjá Útvarpi Føroya, og sum fyrr nevnt eru eisini at partar av føroyska sjónvarpstilfarinum á veg inn í gloymskunar søgu. Vit hava stutt sagt sjofla okkum ein stóran part av tjóðararvi okkara burtur, og tað tykist sum hetta skilið ótarnað sleppur at halda áfram.

**Farið er farið, men hví standa vit í hesi støðuni ?**

Í løgtingslóg um kringvarp v.m., kann hetta lesast:

§ 15. Útvarp Føroya hevur skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum í minsta lagi í 3 mánaðir…

§ 27. Sjónvarp Føroya hevur skyldu til at goyma upptøkur av øllum sendingum í minsta lagi í 3 mánaðir…

Soleiðis er støðan í dag - tað eru Úf og Svf, sum av sínum eintingum velja, hvat kringvarpstilfar skal goymast og hvat skal gloymast. Úf og Svf hava nógvar týdningarmiklar uppgávur, men sum hesi "lógarbrotini" vísa, er uppgáva teirra ikki at agera tjóðgripasavn og tað eiga teir heldur ikki gera.

Í einum notati frá Landsskjalasavninum, "Uppskot til løgtingslóg um bókasøvn" verður skrivað:

"Viðvíkjandi Útvarpi og Sjónvarpi: Sum er er einki, ið tryggjar, at framleitt tilfar hjá ÚF og SVF verður varðveitt. Stovnarnir hava tó sjálvsagdan áhuga í, at hetta tilfar verður goymt fyri at tryggja tað sum grundtilfar, men einki er, ið tryggjar øðrum nýtslu og atgongd. Her skal reglan um upprunarætt og ogn hjá journalistum og framleiðarum sjálvandi eisini havast í huga. LSS hevur við lógini um LSS trygd fyri, at umsitingarligi parturin verður varðveittur og lýstur, men sama ger seg ikki galdandi fyri programpartin."

**Men hvør eigur so at varðveita programpartin av tí føroyskt kringvarpstilfarinum og tryggja m.a. granskarum atgongd til hetta tilfarið?**

Vit eiga eina lóg, sum ikki verður tikin fyri fult, hvørki av mentamálaráðnum ella av okkara Løgtingi: "LØGTINGSLÓG UM BÓKASØVN"

Í henni stendur m.a.

§ 23. Skylduavhendingin er partur av støðinum undir okkara felags tjóðminnum. Avhendingin skal tryggja, at vitanin um føroyska mentan, søgu og føroyskt samfelagslív verður varðveitt til gagns fyri gransking og almenningin yvirhøvur….

§ 24. Av øllum verkum, útgivnum í Føroyum, skulu avhendast 4 ókeypis eintøk til Landsbókasavnið. Skyldan er galdandi **uttan mun til í ella á hvørjum miðli verkið fyriliggur.**

Sólaarklár tala, lógin til varðveitslu av kringvarpstilfari fyriliggur. Stovnurin, ið eigur at varðveita programpartin av tilfarinum hjá SVF, ÚF og hinum útvarpsrásinum, og gera at hetta tilfari atgongiligt, er Føroya Landsbókasavn.

**Men hví hevur so Føroya Landsbókasavn ikki eina einasta hyllametur av kringvarpstilfari ?**

Svarið er, at hesin parturin, sum so mangir aðrir av Løgtingslógini um Bókasøvn, liggur steindeyður. Landsins mynduleikar tykjast ikki at hava nakað søguligt medvit og hava ikki játtað Landsbókasavninum tann neyðuga peningi fyri at seta hendan partin av lógini í verk, men tað, at peningajáttanir og lógarkrøv ikki eru náttúrligir fylgisneytar, tá tað snýr seg um føroyskt lógarsmíð, er jú einki ókent fyribrigdi.

**Hvussu tryggja vit so í framtíðini tað føroyska kringvarpstilfarið ?**

Svarið er, at landsins mynduleikar skulu bara taka "Løgtingslógina um bókasøvn" í álvara, og játta Landsbókasavninum ta evarska lítlu upphædd á komandi løgtingsfíggjarlóg, sum krevst fyri at farast kann í gongd við at varðveita hendan týdningarmikla partin av tjóðararvi okkara.

Hetta ljóðar kanska í so simpult, men længere er den ikke.

**Hvussu gera tey í øðrum londum ?**

Í grannalondum okkara standa bókasøvnini eisini fyri varðveitslu av kringvarpstilfari, og hetta er í dag vanlig parksis í londum kring allan heim. Tað er ikki heilt tilvildarligt at so er, tað finnast nemligani



eitt ótal av grundum til at bókasøvnini standa fyri hesum arbeiðinum. Ein grund av mongum er, at tá man snakkar um at varðveita og útbreiða verk á bókasøvnum, so er tað fyrst og fremmst innihald, man hugsar um, og ikki í hvørjum miðli eitt verk liggur í. Bókin er bara ein av mongum miðlaberum á bókasøvnunum í dag, kringvarpstilfar er ein annar. Ein onnur grund til at tjóðbókasøvnini avheinta kringvarpstilfar er, at tað er lítil trygd í, at einans stovnarnir sjálvir goyma sítt tilfar - hugsa tær - hvis tað kom eldur í SVF í morgin, hvat høvdu vit ikki mist av tilfari, sum hevur alstóran týdning bæði fyri sam- og eftirtíð okkara ?.

**Sum Rasmus Effersøe segði:**

"Latið ei søguna doyggja,
goymið hana so væl,
í dreingja sinni og moyggja
hon mikið útrætta skal"

Við vón um, at ikki bara okkurt, men at tað rætta verður gjørt í hesum málinum.

# Diskriminering

**Álvur Kirke**



Sjúrður Skaale skrivar grein, sum hann kallar "Lógin skal verja tey samkyndu" í blaðnum Fregnir fríggjadagin.

Í greinini verður m.a. sagt, at Gallup setti m.a. henda spurning: "Í Føroyum er við lóg bannað at diskriminera fólk vegna kyn, rasu ella religión. Skal henda lóg eisini umfata tey, ið eru samkynd?"

Heili 65 % svaraðu ja, 17 % søgdu nei, og 18 % vistu ikki.

Sagt verður, at henda lóg er smíðað fyri at verja minnilutar.

Eg hugsaði so, hvørjar minnilutar skal lógin verja?

Nevnda grein svarar sjálv spurninginum: kyn, rasu ella religión, og so verður skoytt uppí: samkynd.

Kyn:

Til eru bara tvey kyn, og hvørki teirra kann sigast at vera ein minniluti.

Bæði eru so nøkurlunda javnt umboðaði!

Rasa:

Í Føroyum eru t.d. myrk fólk ein minniluti, men eg havi ongatíð hoyrt um, at tey ikki hava somu rættindi sum øll onnur.

Religión:

Samb. lóg, hava vit trúarfrælsi í Føroyum, - við ávísum undantøkum.

Tað er eingin trupuleiki at hava og dýrka eina og hvørja religión, - eisini "kristnu" religiónina.

Men, tá onkur loyvir sær at taka kristindómin, Jesus Kristus og Bibliuna, bókstaviliga, verður hann við tað sama kallaður fundamentalistur - í negativum týdningi!

Er ætlanin at verja ein minniluta, so kunnu vit staðfesta, at lógin als ikki virkar á hesum øki!

Samkynd:

Verandi lóg umfatar ikki tey samkyndu.

Vit kunnu staðfesta, at tey sokallaðu samkyndu, eru ein lítil minniluti.

Men tá sagt verður í yvirlýsingini til frama fyri samkynt parlag:

*"Vit ásanna, at tey samkyndu Í Føroyum alt ov leingi hava verið ein minniluti sum hevur fingið eina mannminkandi viðferð í tí føroyska samfelagnum. Tey samkyndu hava ikki kunnað vart seg fyri mismuni og happing og hava eisini ofta verið fyri hatursálopum.*

*Samkyndir føroyingar hava tí verið noyddir at flyta av landinum fyri at sleppa at liva eina virðiliga tilveru.*

*Hetta er ein stór skerjing í frælsinum hjá teimum samkyndu og ikki minst hjá familjum teirra - heilt vanligum føroyskum familjum - sum hava "mist" síni samkyndu børn.*

*Tey samkyndu, sum av ymiskum orsøkum ikki hava megnað at funnið sær friðskjól uttanlands, hava livað í Føroyum undir støðugari hóttan og niðurgering. Hetta kann als ikki góðtakast í einum sivilliseraðum og demokratiskum samfelagi, sum byggir á humanistiska siðvenju."*

Her verður sagt, at tey sokallaðu samkyndu hava
fingið mannminkandi
viðferð
hava ikki kunnað vart
seg fyri mismuni og
happing
hava ofta verið fyri
hatursálopum.
stór skerjing í frælsinum
familjurnar hava "mist"
síni samkyndu børn.
Tey, sum ikki hava
funnið sær friðskjól
uttanlands hava livað
undir støðugari hóttan og
niðurgerðing.

Tað kann ikki bera til, at hetta er allur sannleikin.

Eg loyvi mær at pástanda, at hetta eru leysir pástandir!

Ella í minsta lagið, er ov nógv gjørt av.

**Høpisleys lóg**

Eg má hava loyvi at spyrja:

Um eg ikki hoyri til
eitt minniluta kyn
Um eg ikki hoyri til
eina minniluta rasu
Um eg ikki hoyri til
eina minniluta religión
Um eg ikki
eri samkyndur

Er so loyt at happa meg ?

Ella:
Er loyvt at happa meg fyri alt annað?,
bara ikki vegna kyn, rasu ella religión ?

Eg havi hoyrt um happing í skúlunum. Er tað loyvt ?

Tað kann ikki vera rætt, at gera serlógir, so tað ikki er loyvt at diskriminera fólk vegna kyn, rasu, religión ella kynslig frávik.

Hvat so við øllum hinum.

Tey, sum hava okkurt annað brek, t.d. er onkur lámur, onkur hevur fátæk foreldur, onkur er ov klænur, onkur er ov feitur o.s.fr.

Skulu øll verjast við serlógum, verður listin langur.

Nei, hatta kann ikki vera rætti vegurin at ganga.

Øll eiga at vera líka fyri lógini.

Serlógir, lógir fyri ávísar bólkar, gera bert støðuna fløktari!

ítróttur

Nr. 212 • týsdagur • 5. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ferðin til Georgia fær eftirspæl

**Eftir at Fótbóltssambandið hevur kært, sigur UEFA ætla sær at økja krøvini, soleiðis at trygdin verður størri fyri, at tað í framtíðini verður búleikast undir góðum umstøðum, tá altjóða undankappingar verða spældar**

UNGLINGA-LANDSLIÐINI

*Jóannes Hansen*



*– Vit kunnu ikki standa model til, at ungdómarnir, sum føroysk foreldur sýna okkum álit at hava við á sovornar ferðir, búleikast og liva undir sovornum umstøðum, sum tær, ið U–19 landsliðið upplivdi í Georgia, sigur Ísak Mikladal millum annað um føroysku kæruna, sum eftir øllum at døma fær viðhald frá UEFA*

Foreldur og onnur avvarðandi, sum í framtíðini fara at senda gentur og dreingir við unglingalandsliðunum í fótbólti til EM undankappingar úti í heiminum, nýtast ikki at hava ampa av, um nú umstøðurnar fara at vera soleiðis, at trygd verður fyri reinføri, hita og mati.

Eftir at U–19 landsliðið var komið aftur úr Georgia næstsíðsta mánadag, sendi Fótbóltssamband Føroya bræv við kæru til UEFA, har víst varð á serliga vánaligu umstøðurnar, sum føroyska liðið hevði havt í Tblisi í Georgia í næstsíðstu viku.

## Kæran

Í brævinum verður nágreiniliga víst á, hvussu umstøðurnar vóru: gistingarhúsið var skitið, og tað luktaði illa. Har var ikki nóg mikið til matna til spælarar og hini í føroyska ferðalagnum. Har var eingin hiti í rúmunum, og tað hevði við sær, at føroyingarnir svóvu í klæðum. Har vóru eingi rúm til uppihald og fundir. Føroyska ferðalagið varð biðið um ikki at fara út fyri dyr uttan í fylgi við løgregluni, tí talan var um kriminelt øki.

Víðari verður greitt frá í brævinum frá FSF til UEFA, at føroyski ferðaleiðarin, Børge B. Hansen, mánadagin eftir at føroyingarnir vóru komnir til Tblisi sunnudagin, heitti á franska UEFA umboðsmannin um at koma á gistingarhúsið fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Hann kom, og tað eydnaðist at betra um umstøðurnar, men tær vóru á ongan hátt nøktandi, og tær vórðu als ikki á tí støðinum, sum tað eigur at verða roknað við, at tær eru í sambandi við tílíkar kappingar.

Fótbóltssambandið vísir á, at tað er fullkomuliga órímuligt, at spælarar, sum tað verður roknað við skulu vísa sítt ítarsta á vøllinum, skulu ganga svangir, kaldir, illa til passar og harvið ikki í sinniligari javnvág. FSF spyr, hvat tað er, sum hevur verið og verður gjørt við ungu fólkini. Víst verður harafturat á, at samlaða útreiðslurnar, sum UEFA hevur lagt út fyri føroyska ferðalagið, vóru 450 túsund krónur. FSF verður skuldskrivað fyri ein stóran part av útreiðslunum. Harafturat hevur FSF í sambandi við fyrireikingarnar rindað venjaralønir, fyri venjingarlegur og ymiskt annað.

– Vit kunnu ikki liva við hesum, og vit kunnu ikki rokna við, at foreldur í framtíðini fara at lata teirra børn spæla á landsliðnum, um møguleiki er fyri, at tey aftur enda í sovornum umstøðum, sigur FSF, sum staðiliga heitir á UEFA um at gera nakað við hetta.

## Nógv strangari krøv

UEFA var ikki óvitandi um ótespuligu umstøðurnar, sum føroyska ferðalagið í Tblisi búleikaðist undir. Avrit av kærunum til georgiska fótbóltssambandið varð sent til UEFA.

Sum sagt so varð sera beinleiðis orðaða brævið sent til UEFA og aðalskrivaran Gerhard Aigner mánadagin í síðstu viku, og UEFA legðist ikki á boðini.

Mikudagin og hósdagin í síðstu viku varð fundur á høvuðsstøðini hjá UEFA í Lyon við aðalskrivararnar í fjúrtan teimum minstu fótbóltssambondunum í Europa. Millum teirra eru eisini fótbóltstjóðir sum Norðurírland, Wales og Ísland, og Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF var eisini á fundinum.

– Eg kendi tað, sum um kæran hjá okkum var komin á rætta staðið og í røttum tíma. Allir UEFA stjórarnir við aðalskrivaranum Gerhard Aigner úr Týsklandi á odda vóru á fundinum, og teir tóku málið, sum vit høvdu kært um, upp. Teir nevndu tað ikki ítøkiliga, men tað varð undirstrikað, at ætlanin hjá UEFA var at gera greiðar og strangar rætningslinjur fyri, hvørji krøvini eru til uppihald, mat og umstøður annars til plássini, har undankappingar av tí slagnum, sum yngru landsliðini hjá okkum taka lut í, verða hildnar í framtíðini, sigur Ísak Mikladal, sum ásannar, at tað var neyðugt hjá teimum at kæra:

– Vit kunnu ikki standa model til, at ungdómarnir, sum føroysk foreldur sýna okkum álit at hava við á sovornar ferðir, búleikast og liva undir sovornum umstøðum, sum tær, ið U–19 landsliðið upplivdi í Georgia. Vónandi verður avleiðingin av brævinum, sum vit hava sent, at sovorðið ongantíð aftur fer at koma fyri, sigur Ísak Mikladal.

– Tað er ivaleyst einki at ivast í, tíverri, at onnur áður hava verið úti fyri tí, sum okkara vóru úti fyri hesa ferð. So verður tosað og murrað um vánaligar umstøður, men tá ið eingin ítøkilig skrivlig frágreiðing um tað, sum hevur gingið fyri seg, verður send rætta viðkomandi, so verður einki meiri gjørt. Viðhvørt skal ein spaki kallast ein spaki fyri rætta viðkomandi. Tað gjørdu vit yvirfyri UEFA hesa ferð. Mín fatan er, at teir vóru hjartans fegnir um brævið, og um vit við tí kunnu vera við til at tryggja øllum europeiskum unglingalandsliðum sømilig kor í framtíðini, so er nógv vunnið. So verður tað líka mikið, hvat teir í Georgia kanska halda um okkum í Føroyum, heldur Ísak Mikladal.